

# Atlantic Petroleum borar fyrsta brunnin í Norra

Jan Müller

14.01.2014 - 10:49

Oljan.fo

**Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum, sum fyri nógvum árum síðani fór út um landoddarnar, er nú komið eitt týðandi stig víðari í sínum virksemi. Tað hevur júst sett á at bora sín fyrsta brunn á norska landgrunninum, ið verður nevndur Langlitinden.**

Tað var í desember í fjør, at felagið boðaði frá, at tað hevði gjørt av at keypa seg inn í loyvi á norskum øki. Felagið keypti 10% frá oljufelagnum Det Norske í loyvi PL 659 í Barentshavinum. Loyvið liggur 165 km í ein útnyrðing úr Hammerfest. Tað er pallurin Transocean Barents, sum borar henda fyri Atlantic Petroleum týðandi og spennandi brunnin. Borað verður niður á 2900 metra dýpi og er boritíðin mett til 50 dagar.

Det norske er fyristøðufelag við 20%, meðan Petoro hevur 30%, Lundin 20%, Tullow 10%, Atlantic Petroleum 10%, Rocksource 5% og Itacha 5%.

Ben Arabo, stjóri sigur seg vera fegnan um, at felagið nú hevur sett á undirgrundina í norskum øki fyri fyrstu ferð. Langlitinden er tann fyrsti av fýra brunnum, sum felagið fer at bora í ár.